

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 03 - 2013

# IEA væntar minni eftirspurning eftir olju

Altjóða Orkustovnurin IEA sigur í einari nýggjari meting, at eftirspurningurin eftir olju verður 90,62 milliónir tunnur um dagin í ár. Tað er 820.000 tunnur meiri enn metingin fyri í fjør. Um fyrsta ársfjórðing í ár sigur IEA, at eftirspurningurin hesar mánaðirnar verður 90,0 milliónir tunnur um dagin, og tað er eitt vet minni, enn IEA metti fyrr í ár. Samstundis sigur IEA, at eftirspurningurin verður 20.000 tunnur minni um dagin í øðrum ársfjórðingi, 40.000 tunnur minni í triðja ársfjórðingi og loksins 120.000 tunnur minni í seinasta ársfjórðinginum. Altjóða Orkustovnurin sigur, at útboðið á altjóða oljumarknaðinum vaks 90.000 tunnur um dagin í februar og kom upp á 90,8 milliónir tunnur, og at meginparturin av vøkstrinum komst av einum veksandi útboði av olju úr Irak. Framleiðslan uttan fyri OPEC-felagsskapin minkaði hinvegin 60.000 tunnur um dagin í februar og var 54,1 milliónir tunnur. EIA sigur, at framleiðslan uttan fyri OPEC fer væntandi at økjast 1,1 millión tunnur um dagin í ár, soleiðis at hon verður 54,5 milliónir krónur í meðal.